## SÍ-ÍF í annaðkvøld

Upprunaliga skuldi dysturin millum SÍ og ÍF í Eik-liguni hjá monnum verið spældur leygardagin, men av tí at serliga ÍF hevði fleiri spælarar við í FM-kappingunum hjá mansunglingum, var hann útsettur. Dysturin verður í Sørvági í annaðkvøld klokkan 20.30, og tá fær SÍ aftur møguleikan at nærkast hinum FM-finalistinum, Mjølnir, sum við einum dysti meira er trý stig frammanfyri



## StÍF-Stjørnan í kvøld

Í kvøld klokkan 20 verður ein dystur í ítróttarhøllini á Skála, har kvinnurnar hjá StÍF taka ímóti Stjørnuni. Hetta er seinasti dysturin í hesum umfarinum, og tá hann er spældur, hava øll liðini í Sunset-kappingini verið í gongd 17 ferðir. Stjørnan kann styrkja sær oddasessin við sigri, meðan StÍF – skuldi sensatiónin verið har – kann koma upp á sama stigatal sum VÍF á fjórða plássi.

### Neistin-VÍF 30-20 (15-8):

# Neistan tekur bronsuna

**Við trygga sigrinum á VÍF í gjárkvøldið, kundu kvinnurnar hjá Neistanum tryggja sær bronsuna í Sunset-kappingini**




Hilmar Jan Hansen

Tað hevur leingi ligið í luftini, at Neistin fór at strúka avstað við bronsuheiðursmerkjunum í Sunset-kappingini, tí liðið hevur verið væl betri enn tey niðaru liðini, samstundis sum tað ikki er eydnast Neistanum at fáa somu dygd í spælið sum tey bæði ovaru, Stjørnan og Tjaldur. Í gjárkvøldið fekst so eisini matematisk vissa fyri, at Neistin endar á triðja plássi.

Kvinnurnar hjá VÍF, ið hava verið eitt tað positivasta íkastið til kappingina í vetur, vitjaði Neistan á Hálsi, men her gjørdist tað ongantíð so spennandi, at stórvegis ivi var um, hvønn veg dysturin fór. Tað var nokk so javnt fyrstu løtuna, men so fór Neistin frá VÍF, ið ongantíð av álvara fekk fatur í heimaliðnum aftur.

Hálvleiksstøðan var 15-8 til Neistan, sum tó rendi seg í málturk ta allarfyrstu løtuna av seinna hálvleiki, tá VÍF gjørdi ein vørr. Eina løtu var støðan 16-12, men so fór Neistin aftur avstað og gav ongantíð VÍF møguleikan at koma innaftur í dystin. Heldur ikki, tá Neistin síðstu løtuna gav fleiri av teimum møguleikan, ið annars ikki hava spælt so nógv.

Serliga í verjuspælinum vísti Neistin góðar taktir, og ein spælari sum Liljan Djurhuus hjá VÍF, ið plagar at vera góð fyri nógv mál, fekk bert tvey mál í opnum spæli, tí paradurnar hjá Neistanum tóku tað nógva.

**Hondbóltur**

**Sunset-kappingin**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 16 | 14 | - | 1 | - | 1 | 468 | 320 | 148 | 29 |
| 2 | Tjaldur | 17 | 14 | - | 1 | - | 2 | 499 | 382 | 117 | 29 |
| 3 | Neistin | 17 | 10 | - | 0 | - | 7 | 451 | 411 | 40 | 18 |
| 4 | VÍF | 17 | 5 | - | 0 | - | 12 | 406 | 477 | -71 | 10 |
| 5 | StÍF | 16 | 4 | - | 0 | - | 12 | 379 | 477 | -98 | 8 |
| 6 | VB | 17 | 2 | - | 0 | - | 15 | 361 | 497 | -136 | 4 |



Kvinnurnar hjá Neistanum tryggjaðu sær bronsuna í Sunset-kappingini, tá tær í gjárkvøldið vunnu trygt á VÍF
Mynd: Álvur Haraldsen

# Fótbóltskvinnurnar aftur ímóti Eysturríki

**Føroyska kvinnulandsliðið í fótbólti hevur í sterku kappingini í Portugal ferðast í fremsta fótbóltsumhvørvi, ið hugsast kann. Í dag spæla tær ímóti Eysturríki um 11./12. pláss í kappingini**




Hilmar Jan Hansen



**Føroyska liðið, sum byrjaði dystin ímóti Eysturríki, ið var tann seinasti í bólkaspælinum niðri í Portugal**
Mynd: FSF

Longu frammanundan var greitt, at sterka kappingin í Algarve í Portugal var ein ovurhonds stór avbjóðing, tí í hesi kapping eru øll tey fremstu kvinnulandsliðini í heiminum. Og hóast Føroyar komu í veikasta bólkin saman við Portugal, Rumenia og Eysturríki, so vísti tað seg, at hesi lið vóru ivaleysa sterk.

Eisini vóru fyrireikingarnar darvaðar av kava, so dystarvenjingn ikki hevur verið tann stóra, umframt at hini londini um hetta mundið eru mitt í sínum kappingum. Kortini hava føroysku fótbóltskvinnurnar gjørt sítt besta og eru við góðum treysti farnar á vøllin at stríðast við yvirmaktina.

Í dag spæla tær seinasta dystin á Portugal-ferðini, sum er í 11./12. pláss í kappingini, og verður spælt ímóti Eysturríki, sum kvinnurnar vóru í bólki saman við og tí longu hava spælt ímóti eina ferð. Hóast hugburðurin hevur verið góður og viljin tað sama, eru ikki stórvegis vónir um annað enn aftasta pláss í kappingini.

### Sterk mótstøða

Fyrsti dysturin í bólkaspælinum var mikudagin ímóti portugisisku vertunum, sum løgdu hart út beinanvegin. Serliga fyri steðgin var Portugal nógv betri og fekk fýra av teimum fimm málunum, ið góvu 5-0 sigurin. Beinanvegin í seinna hálvleiki økti Portugal, men so tóktist tað, sum føroysku kvinnurnar mentust og enntá komu til onkran málmøguleika, uttan tó at fáa nakað mál burturúr.

Í øðrum dystinum var talan um eina uppgerð við Eysturríki, sum Føroyar traditionelt hava givið stóra mótstøðu. So var eisini, tí bæði Heidi Sevdal og Rannvá Andreasen høvdu næskar royndir, men uttan at fáa mál. Í staðin fekk Eysturríki tvey mál fyri steðgin og eitt aftaná, so talan gjørdist um ein 3-0 sigur. Føroyar vóru ikki so væl við í seinna hálvleiki, men vardu kortini væl.

Síðsti dysturin í bólkaspælinum var mánadagin, tá Føroyar taptu 1-5 fyri Rumenia, eftir at støðan í hálvleikinum hevði verið 0-0. Men beinanvegin eftir steðgin fekk Rumenia tvey mál, og løtu seinni eydnaðist Olgu Kristinu Hansen at minka um munin. Í fyrra hálvleiki og langt inn í seinna hálvleik var ikki stórvegis munur á liðunum, men ímóti endanum skrædnaði, so Rumenia fekk trý mál aftrat og vann greitt.

Talan hevur samanumtikið verið um sera sterka mótstøðu, og til samanberingar kann nevnast, at kvinnulandsliðið undan hesi kappingini bara hevur tapt ein av teimum 10 dystunum, tað hevur spælt síðstu tvey árini.